## DAGSINS MEINING

# Áheitan á Henrik Larsen

Tað eru nú liðin gott og væl fýra ár síðani, at okkara fremsti fótbóltsspælari, Todi Jónsson, seinast var at síggja á fótbóltslandsliðnum. Mong vóru tey, sum ilskaðust um avboð hansara í síni tíð, og tó at grundgevingin fyri hesum var greið, vóru tað ikki øll, sum góðtóku hesa.

Seinasta summar hendi so tað gleðiliga fyri føroyskan fótbólt, at Todi segði seg aftur vera til reiðar at tørna út fyri Føroyar. Hann hevði tá í eina tíð lítið og einki merkt til skaðan, sum so ofta áður hevði argað, og tí helt hann, at beinini - framleiðslutól hansara - nú aftur megnaðu at taka avbjóðingina á seg. Og eingin - eingin - sum sá myndirnar frá tíðindafundinum ta ferðina, mundu ivast í, at Todi var fegin um, at hann nú aftur kundi umboða føðilandið. At síggja til so róligi klaksvíkingurin gav tárunum frítt at fara, tá innilæstu kenslurnar, sum landsliðsavboðið hevði havt við sær, skuldu sleppa út.

At tað so hevur verið lagnunnar speisemi, at skaðar av bæði einum og øðrum slag hava forðað fyri nøkrum landsdystum fyri hansara viðkomandi síðani, er eitt. Annað er, at nú eru hesir skaðar burtur. Okkara fremsti spælari er til reiðar at vera sterkasti trumfur okkara til komandi avbjóðingarnar móti Sveis og Írlandi. Men hann verður ikki úttikin til liðið.

Grundgevingarnar hjá landsliðsvenjaranum í hesum eru, at er ein spælari ikki í nóg góðari dystarvenjing, so kann hann ikki spæla. Sjálvandi kunnu venjararnir hava hesa áskoðan, men fyri tað nýtist ikki øllum at vera samd í hesum.

Partvíst, so hava venjararnir fyrr havt spælarar við, uttan at dystarvenjingin hjá hesum hevur verið nóg góð. Uttan at siga nakað ilt um nakran, so hava verið og eru spælarar á liðnum, sum spæla í næstbestu føroysku deildini. Liðið hevur innihildið spælarar, sum júst eru afturkomnir eftir skaðasteðg, og liðið hevur innihildið spælarar, sum í besta føri hava verið á beinkinum í útlendskum feløgum. Tað hevur Todi eisini verið, men hann venur hvønn dag saman við nøkrum av bestu spælarunum í Danmark, og hann kappast hvønn dag við hesar um pláss á superliguliðnum, sum hevur vunnið danska meistaraheitið tvær.

Men fyrst av øllum, so eiga bæði vit og landsliðsvenjararnir at seta okkum spurningin, um vit hava ráð at vera Toda fyriuttan. Hetta er okkara fremsti fótbóltsspælari, sum í dystunum móti eitt nú Sveis ella Írlandi kann vera júst tann trumfurin, sum vit hava tørv á. Um hann er førur fyri at spæla tvær ferðir 90 minuttir er ikki tað týdnignarmesta í hesum. Er hann bara førur fyri at spæla tvær ferðir 30 minuttir, so er hetta eisini nakað, sum er vert at satsa uppá. Hetta kann vera nóg mikið hjá honum til eitt av ófatuliga skjótu rykkum hansara. Til eina draging, sum - kanska - kann skapa møguleikan fyri hálvu ella heilu sensatiónini. Tí hava vit tørv á Toda. Ikki tí uppgávan hjá landsliðnum verður ógjørlig uttan hann, men tí sannlíkindini fyri at røkja uppgávuna væl eru størri við enn uttan Toda.

Tað er okkara vón, at hetta vantandi úttøkan av Toda er eitt stórt mistak. Mistøk eru menninskanslig, og sjálvandi skulu venjararnir eisinii hava loyvi at gera slík. Men tað er eisini ein menninskjanslig styrki, um tú dugir at síggja egin mistøk og torir at bera í bøtuflaka fyri hesi. Mistakið hesaferð er gjørt í somikið góðari tíð, at enn ber til at rætta tað. Tí skal tað vera okkara vón, at Henrik Larsen kemur til niðurstøðuna, sum er skilabest fyri føroyska fótbóltslandsliðið. Nevnliga at seta Toda á landsliðið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Øll skulu hava rætt til Miðnám

**Tað er onki minni enn ein falliterklering, at almennu Føroyar nokta 60 skikkaðum umsøkjarum pláss í Miðnámsskúla. Eingin ivi er um, at vitan er størsta tilfeingið hjá einum nútímans landi. Tí eiga vit at síggja tað sum eina íløgu at slúsa so nógv fólk sum gjørligt gjøgnum útbúgvingarskipanina, heldur enn at senda tey út í meiningsleyst arbeiðsloysi**



**John Johannessen,**
*tingmaður fyri Javnaðarflokkin*

Sum partur av samgonguni ætli eg mær undir ongum umstøðum at góðtaka, at fólk verða tveitt út í arbeiðsloysi, heldur enn at sleppa í skúla.

Allir skikkaðir umsøkjarar hava rætt til at sleppa inn á miðnámsskúla. Hetta er ein lógarfestur rættur, sum løgtingið samtykti fyri 10 árum síðani.

Hetta er eisini ein heilt náttúrligur rættur. Tí tað er jú almenn vitan, at skúlaskapur og økt vitan, eru bestu íløgurnar fyri samfelagið og einstaka menniskjað.

### Visjón - ikki koddi

Vit ætla okkum at vera millum heimsins fremstu tjóðir í 2015. Skal hetta málið eydnast, er umráðandi, at so nógv ung, sum yvirhøvur gjørligt, antin taka eina miðnámsútbúgving ella aðra førleikagevandi útbúging eftir loknan fólkaskúla. Hetta er treytin, fyri at vera við í alheimsgerðini. Og vit mugu taka neyðugu stigini beinanvegin. "Visjón 2015" skal ikki vera ein koddi, men eitt spark í afturpartin.

Hetta hava okkara grannalond langt síðani ásannað. Tì hevur tað millum annað volt til stóra rannsakan í Danmark, at talið av dønum, ið taka miðnám eftir fólkaskúlan, ikki er hækkandi. Enn størri rannsakan átti tað at volt okkum, at Føroyar liggja á aftasta plássi, tá talan er um framhaldandi lestur eftir fólkaskúlan.

### Spara eftir hæli

Fekk sum vátan vøtt frammaná, tá eg í Degi og Viku týskvøldið hoyrdi, at ein heilur hópur av skikkaðum umsøkjarum ikki sleppa í miðnámsskúla næsta skúlaár orsakað av pengatroti í Mentamálaráðnum.

Visti, at játtanin á fíggjarlógini til miðnámsskúlarnar var heldur lítil. Men helt, at trupulleikin var loystur, tá eg tann 14. mei var við til at atkvøða fyri 2 milliónum eyka til rakstur av miðnámsskúlunum. Hetta var sambært upplýsingunum frá fíggjarnevndini tann upphæddin, ið skuldi til, fyri at kunna taka allar skikkaðu næmingarnar inn.

Men sambært Mentamálaráðnum er neyðugt við 1,5 mió. afturat, um trupulleikin skal loysast.

Hetta boðar frá, at antin hevur Mentamálaráðið ilt við at halda skil á pengunum, ella hevur fíggjarnevndin ikki rætta viljan at játta pening til skúlaskap.

Líkamikið hvør orsøkin er, so er tað ein sparing eftir hæli at spara á skúlaøkinum. Tað er í øllum førum ikki ein íløga at tveita fólk í ALS, heldur at játta teimum skúlaskap.

# Norðfra og Fiskavirking finna aðrar leiðir

**Ólavur Ólason Poulsen**
*Formaður í Klaksvíkar Útróðarfelag*

Eftir at hava hoyrt stjóran á Norðfra klaga sýna neyð í fjølmiðlunum, kann eg sum formaður í Klaksvíkar Útróðrarfeglag ikki lata hetta fara ósvarað, og skal eg hervið gera nakrar viðmerkingar til málið.

At Norðfra hevur trupulleikar og ikki er kappingarført, tá ið umræður at keypa rávøru, viðkemur hvørki fiskiflotanum ella politikkarunum.

Norðfra og aðrir keyparar hava verið frammi í fjølmiðlunum í longri tíð og tosa um lágan dollarkurs og blíva við at rópa upp í saman í staðin fyri at finna aðrar marknaðir.

Alt hettar kann verða við til, at órógva politikarar tá ið avgerðir skulu takast. Her hugsi eg serliga um tær fríu marknaðarkreftirnar, sum hava verið virknar í longri tíð.

Henda góða skipan við einum vælvirkandi fisknamarknaði har altjóða kapping er um fiskin, er tað ið skal til fyri at varðveita kappingarføri innan fiskivinnuni bæði á sjógvi og landi.

Stjórin á Fiskavirking, var frammi í fjølmiðlunum har hann stuðlaði stjóranum á Norðfra, at bert fløk skuldu útflytast. Àlvaratos tit baðir, tit skuldi heldur roynt at havt hægri mál enn bert at tosa um fesk fløk.

Mín vón er, at vinnan á sjógvi og landi fær frið at virka og framhaldani mennist og varðveitir kappingarførið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.